# má



*Beinta í Jákupsstovu greiðir frá um kvinnuumboðan í føroyskum kommunalpolitikki*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

minst hjá einum óroyndum konufólki. Á fundinum var millum annað skotið upp, at hækkað talið av sessum, til dømis til tað dupulta og at broyta vallógina soleiðis, at helmingurin av tinglimunum skulu vera kvinnur. Hetta út frá teirri sannføring, at helmingurin av fólkinum eru kvinnur, og tí skal eisini helmingurin av teimum ráðandi vera kvinnur. Í hesum sambandi verður ofta sagt, at kvinnurnar fyrst skulu prógva, at tær eru egnaðar, og ikki bara veljast, tí tær eru kvinnur. Til hetta kundi verið sagt, at sum er, hava vit eina maskulina ímynd av, hvat er ein góður politikari, og at kvinnuligir politikarar eru ikki menn, men júst kvinnur og politikarar. Hetta ger tær ikki minni egnaðar, men øðrvísi politikarar. Og tær eru og vera helmingurin av fólkinum.

### Fyrimyndir og kvinnulistar

Í Íslandi og Norra hevur kvinnurørslan í mong ár arbeitt miðvíst fyri at gera fólk tilvitandi um leiklutin hjá kvinnum. Í hesum grannatjóðum vára, hava kvinnurnar havt tvær miklar fyrimyndir, Vígdis og Gro, og hevur hetta avgjørt eisini havt týdning fyri, at aðrar kvinnur við áhuga fyri politikki, hava fingið dirvi til at bjóða seg fram. Hetta samstundis sum áhaldandi herferðir hava hildið lív í kvinnusakini. Annað, sum hevur verið vanligt í hesum londum upp gjøgnum 70' og 80'ini, vóru reinir kvinnulistar, sum óbeinleiðis gjørdu, at hinir flokkarnir gjørdu meira fyri at fáa kvinnur á listarnar og valdar. Teir gjørdust snøgt sagt bebbarøddir fyri kvinnunum, og kenna vit ikki eisini hetta úr Føroyum? Eitt nú undan seinasta býráðsvalið, tá tað ljóðaði, at ein kvinnulisti fór at vera stillaður upp. Tá kann vera at flokkarnir fingu úr at gera at fáa kvinnur uppá, og sæst hetta ikki minst aftur í kynssamansetingini í Tórshavnar Býráð nú. So, hóast okkum kanska ikki líkar kvinnulistar, kunnu teir kanska vera við til at seta gongd á hinar flokkarnar.

### Stuðulsbólkar

"Vit kvinnur í altinginum hittast heima hjá hvørjari aðrari á hvørjum ári. Tvørtur um floksmørk práta vit, eta, drekka vín og dansa."

Soleiðis sigur Siv Friðleifsdottir, altingskvinna og fyrrverandi ráðharri í umhvørvismálum og javnstøðumálum, og váttar hetta eisini nakað av tí, sum prátað varð um á fundinum á háskúlanum. Nevniliga týdningurin av persónligum stuðli, tá kvinnur stilla upp. Hetta er kent fyribrigdi í nógvum flokkum, og minnast vit tað frá tá Marita Petersen, sála, stillaði upp á sinnið. Hon hevði ein góðan bólk av kvinnum, sum stuðlaðu henni. Tær hittust eina ferð um vikuna, løgdu til rættis og prátaðu um valið, sum stóð fyri framman. Eisini aftaná valið hildu tær fram at hittast.

Á fundinum greiddi Bjørg Jacobsen frá um kanning, sum hon hevur gjørt av valunum í 90'unum, í ávikavist Vestmanna og Tvøroyri. Á báðum støðum vóru kvinnur uppstillaðar, men eydnaðist tað bert Vestmanna at fáa kvinnur valdar. Hetta komst av, at baklandið var støðugt, hugnaligt og sterkt, og at kvinnurnar sum vóru aftanfyri tjaldið, dugdu at skipa fyri og at stuðla valevnunum. Á Tvøroyri harafturímóti vóru aðrar mekanismur galdandi, og var tað ógjørligt at savna ein stuðulsbólk. Har varð eingin kvinna vald.

### Herferðir

Eitt sum varð nevnt á fundinum, og sum vit kanska hava gjørt ov lítið burturúr her í landinum, eru málrættaðar herferðir, sum skulu vera við til at broyta aldagamla hugburðin hjá føroyingum, um at kvinnur skulu helst tiga. Í Íslandi, har tey hava drúgvar royndir við kvinnum í politikki, skipaðu tey fyri nøkrum árum síðani fyri eini skemtiligari og rámandi lýsingaherferð, og vóru tað millum annað formenninir í flokkunum og altingslimir, sum stóðu á odda fyri herferðini. Hon hepnaðist so væl, at talið av kvinnum hækkaði munandi aftaná. Siv Friðleifsdóttir sigur:

– Á altingsvalinum í 2003 lækkaði talið av kvinnum við 5 prosentum. Hetta var ein skelkur fyri okkum. Men undan valinum høvdu vit onga herferð um, hvussu týdningarmikið tað er við fleiri kvinnum. Tá lærdu vit, at vit mugu alla tíðina vera á varðhaldi og stríðast fyri at fáa kvinnur valdar. Um vit láta sum einki, kemur tað okkum aftur um brekku..!"

So hóast 8. mars átti at verið ein hátíðardagur, hava vit ikki nógv at hátíðarhalda, tá umrøður føroyskar kvinnur í politikki. Vónandi fer pallborðsfundurin í Sjónleikarhúsinum at seta hol á eitt nýtt tíðarskeið í føroyskari kvinnusøgu.. Nú kann kurvan bara ganga ein veg – upp.

> „ Heidi Petersen: *Eg hevði ikki vilja verið politikari, tá børnini vóru smá. Av tí at tað ikki er vanligt at konufólk traðka fram í Føroyum, so verður prísurin ov høgur fyri familjuna og børnini. Tað er neyðugt at hava góðan maka heima og eitt gott bakland.*

# Føroyar eftirbátar í kvinnuumboðan

**Cambodia, Bhutan, India og Somalia hava nakað til felags við Føroyar.**
**Í øllum hesum londum er kvinnuliga umboðanin í Tjóðartinginum minni enn 10 prosent.**
**Í Føroyum eru einans tríggjar kvinnur í Løgtinginum – eitt sera lágt tal samanborið við londini rundan um okkum**

POLITIKKUR
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Anita á Friðriksmørk, Lisbeth Petersen og Heidi Petersen eru tær tríggjar, sum samanlagt umboða helvtina av føroya fólki - kvinnurnar.

Í Føroyum er kvinnuliga umboðanin í Løgtinginum einans 9.4 prosent. ì miðal í øllum heiminum eru 16,3 prosent av tjóðartingslimunum konufólk. Hetta er nýtt met skrivar meginfelagið hjá tjóðartingunum kring heimin IPU.

Felagsskapurin staðfestir, at 2005 var eitt gott ár hjá kvinnunum. 20% av teimum valdu vóru konufólk í teimum 39 tjóðartingsvalunum, íð vóru hildin kring heimin. í heili 28 av valunum øktist umboðanin hjá kvinnunum.

Í hinum Norðurlondunum stendur væl til við tí kvinnuligu umboðanini. ì Svøríki, sum er nummar tvey í øllum heiminum, eru 45,3 prosent av tjóðartingslimunum kvinnur. Norra 37,9 prosent, Finland 37,5 og Danmark 36,9. Ísland er á 13. plássi við 33,3 prosentum.

Bæði Norra og Danmark hava haft oman fyri 30 prosent síðan 1985, og tølini eru ikki nógv broytt seinastu árini. Á valinum í 2005 minkaði talið hjá Danmark nakað. Eisini í Týsklandi minkaði kvinnuumboðanin nakað.

| | land | % kvinnulig umboðan |
|---|---|---|
| 1 | Rwanda | 48.8 |
| 2 | Svøríki | 45.3 |
| 3 | Norra | 37.9 |
| 4 | Finland | 37.5 |
| 5 | Danmark | 36.9 |
| 6 | Holland | 36.7 |
| 7 | Kuba | 36.0 |
| 8 | Spania | 36.0 |
| 9 | Kosta Rica | 35.1 |
| 10 | Argentina | 35.0 |
| 11 | Belgia | 34.7 |
| 12 | Eysturríki | 33.9 |
| 13 | Ìsland | 33.3 |
| 14 | Suður Afrika | 32.8 |
| 15 | Ný Sæland | 32.2 |


# Søkt verður eftir lærara

at byrja 1. apríl 2006 fyribils til 30. juni 2006 fyri lærara í barnsburðarfarloyvi.

Starvið er tíðaravmarkað og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Viðkomandi skal undirvísa í føroyskum, enskum og kristni í framhaldsdeild.

Ert tú opin fyri samstarvi og til reiðar at taka ímóti avbjóðingum, ert tú vælkomin at søkja.

Umsóknirnar skulu verða **Eysturskúlanum, Postboks 3178, 110 Tórshavn**, í hendi í seinasta lagi 23. mars 2006.

Meira fæst at vita um starvið frá skúlastjóranum Eyðdis Eidesgaard tlf. 214752.

**Eysturskúlin**